

# Skansi hevði 93 milliónir í yvirskoti í 2014

**Jógvan Hugo Gardar**

26.03.2015 - 18:20

Oljan.fo

Skansi Offshore P/F hevur í dag havt ársaðalfund, har ársroknskapurin fyri 2014 varð lagdur fram og góðkendur.

Ársúrslitið hjá samtakinum gjørdist eitt yvirskot á 93 milliónir krónur, harav minnilutaeigarar eiga 36 milliónir krónur. Eginpeningur samtaksins við árslok í 2014 var 257 milliónur krónur og parturin hjá minnilutaeigarum 191 milliónur krónur, til samans 448 milliónir krónur. Við árslok í 2014 javnvigaði fíggjarstøðan hjá samtakinum við 1,5 milliardum krónum.

Í tíðindaskrivi verður sagt at nevnd og stjórn eru nøgd við úrslitið.

Skansi Offshore eigur og rekur fimm nýmótans frálandaskip, harav øll arbeiða í Norðsjógvinum í løtuni.

Felagið sigur at marknaðurin fyri frálandaskip er undir trýsti í løtuni orsaka av ov stórum útboði av skipum og minkandi íløgum hjá oljufeløgunum. Ein týðandi orsøk til minkandi íløgurnar er stóra fallið í oljuprísinum seinastu tíðina.

Skansi Offshore hevur langtíðarsáttmálar fyri meginpartin av flotanum við stór og vælkonsolideraði oljufeløg, sum BP og BG.

Leiðslan í felagnum heldur at vónirnar fyri 2015 góðar, havandi í huga at flestu skipini longu eru sáttmálabundin alt árið.

Hjá Skansi Offshore samtakinum starvast í dag 135 starvsfólk, harav 120 sjófólk, allir føroyingar.